# Æðuvík – ein øgilig ferðsla

Jólabygdin Æðuvík dregur nógv fremmanda fólk til bygdina. So nógv, at ferðslan meiri enn tvífaldast jólamánaðin, í mun til meðalferðsluna annars. Sambært Landsverk er vanliga meðalferðslan 350 akfør um døgnið. Men ferðsluteljingin um jólini vísir heilt onnur tøl. Frá 30. november til 25. desember ferðaðust tilsamans 21.816 akfør til og frá Æðuvík. Í meðal er tað 873 um døgnið. Við øðrum orðum meiri enn tvífaldaðist ferðslan til og frá Jólabygdini í jólamánaðinum.



# Spælipláss til Bryan ikki avtalað enn

Sambært heimasíðuni www.concerts.dk, verður Bryan Adams at síggja á palli á Tórsvølli tann 4. juni. "Torshavn Stadium, Faroe Islands" stendur upplýst sum spælistað har. Hetta er tó ikki heilt rætt, tí enn er ikki endaliga avgreitt, hvar Bryan Adams skal spæla, sigur Dennis Holm, ein av fyrireikarunum av konsertini við Bryan Adams í Føroyum, tá vit vilja hava hann at vátta tíðindini. Hann sigur víðari, at atgongumerkjasølan gongur væl. – Tað gongur fínt og eg vil siga, at tað er komið so langt nú, at fólk skulu skunda sær, um tey ynskja at keypa eitt atgongumerki, sigur Dennis Holm.

## Tilhaldið til eldri niðurpínt

Á veljarafundinum í Tilhaldinum í gjár, varð eisini tosað eitt sindur um, hvussu stóran týdning, Tilhaldið hevði.

Tað vóru tað fleiri politikarar, sum bóru upp á mál.

Samstundis vóru tað mong, sum harmaðust um, at fíggjarliga gávumildni ikki var líka stórt sum, vælvildin annars, tí allur tann góði viljin, sást sanniliga ikki aftur í fíggjarligu játtanini til Tilhaldið.

Ein uppgerð vísti, at í 1998 fekk Tilhaldið 650.000 krónur og hevði 7.860 vitjandi.

Tá var Tilhaldið 150 fermetrar stórt.

Í 2006 var játtanin 737.942 krónur, men tá hevði Tilhaldið fingið betri rúmd og hevði nú 546,8 fermetrar til taks.

Samstundis var talið á vitjandi hækkað upp í 11.788 vitjandi

Í 2007 minkaði játtanin aftur niður í 689.896 krónur og hevði ikki færri enn 13.000 vitjandi.

Sostatt er talið á vitjandi næstan tvífaldað og hølini næstan fýrafaldað, men játtanin er næstan tann sama.

# Bleyt virði og g

**Ynskini vóru jarðbundin men lyftini vóru gylt, tá ið pensjónistarnir í Tilhaldinum í Havn fingu høvi til at hitta politikarar á veljarafundi í gjár, men teir fingu eisini av grovfílini**



*Teir hava nógvar ætlanir um at gera umstøðurnar hjá pensjónistunum betri. Frá vinstru eru teir Óli Breckm… Poulsen. Sjálvir eru pensjónistarnir mest áhugaðir í fyribyrgjandi heilsutiltøkum og ábótum á pensjónina*

VAL 08
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Tá ið politikarar dyrgja eftir atkvøðum, plaga tað ikki at skorta upp á lyfti.

Tað gjørdi tað heldur ikki, tá ið politiskur fundur var í Tilhaldinum í Havn seinnapartin í gjár, har pensjónistar høvdu høvi til at hoyra, hvørjar ætlanir teir ymsu flokkarnir hava á eldraøkinum.

Men samstundis fingu politikararnir høvi til at hoyra, hvat rørist ímillum tey gomlu og, hvørji teirra politisku ynski, tey hava.

Og ikki skerst burtur, at ynskini frá teimum gomlu eru eyðmjúkari og meiri jarðbundin enn tey háfloygdu lyftini frá politikarunum vóru viðhvørt.

Tað, sum tey gomlu vóru serliga áhugað í, var at fáa ábótur á pensjónina.

Men so vóru tað eisini mong, sum vísti á, hvussu stóran týdning tað hevði, at myndugleikarnir settu fyribyrgjandi tiltøk í verk.

- Hóast tað eru mong eldri, sum hava góða heilsu høgt upp árini, eru tað eisini nøkur, sum fáa sjúkur at dragast við

Í hesum samband vóru tað mong, sum harmaðist um, at likamsvenjingin, sum hevði verið fyri teimum eldru á Tjarnargarði, var hildin uppat, tí at játtan ikki fekst til ein fysioterapeut at standa fyri venjingini.

Tey løgdu eisini áherðslu á, at ein serlækni í eldrasjúkum varð settur á Landssjúkrahúsinum.

- At hava ein eldralækna á Landssjúkrahúsinum, hevur líka stóran týdning, sum at hava eina barnalækna.

Tey harmaðust eisini um, at umstøðurnar til at venjingar eftir heilabløðingar og blóðtøpp, vóru so vánaligar.

Tey mæltu eisini til, at tey eldru fingu eina fyribyrgjandi læknakanning um árið.

Hinvegin fegnaðust tey um, at ókeypis koppseting ímóti beinkrími varð sett í verk.

### Pensjónin røkkur ikki til

Men politikarar fingu eisini av grovfílini.

- Var tað ikki fyri tað, at tit vóru bjóðaðir at koma í Tilhaldið, hevði eg spurt, hvat tit biltu tykkum inn at koma higar, segði ein rættiliga bersøgin Simme.

Hann vísti á, at hann og konan høvdu fastar útreiðslur til hús, olju, tryggingar, sjúkrakassar og annað upp á 15.000 krónur um mánaðin.

Tað er tað sama, sum pensjónin er.

Tá er onki roknað upp í til mat, klæði, atgongumerki, jóla- og føðingardagsgávur, okkurt atgongumerki til okkurt tiltak av og á.

- Vit liva ikki, vit yvirliva

Sostatt staðfesti hann, at tað er eyðsæð, at pensjónin røkkur slett ikki til og tað nyttar hvørki at tosa við tey okkum um Framsjón 2015 ella tosið um tjóðskaparligt og persónligt frælsi.

- Tað liva vit ikki av. Vit liva her og nú og nógv av okkum liva kanska slett ikki í 2015.

Hann helt eisini, at tað var alneyðugt at pensjónin aftur verður prístalsviðgjørd, soleiðis sum hon var fyrr.

Í sambandi við pensjónirnar, skeyt Finnur Johansen upp, at eins og hjún verða skattað hvør sær, skulu tey eisini fáa pensjón hvør sær

Tað vóru politikarar samdir í. Í øllum førum eiga eini hjún ikki at missa so nógv í pensjón, sum tey nú gera, afturímóti tí, sum einstaklingar fáa.

- Av tí, at hjún hava felagsútreiðslur, fáa tey minni í pensjón, enn einstaklingar fáa, men fleiri politikarar eru sinnaðir at hyggja upp á tað.

Tað vóru eisini teir, sum hildu, at pensjónistafeløgini eiga rætt og slætt at vera fakfelagið hjá teimum gomlu og samstundis eiga allir pensjónistar at vera limir.

Onnur hildu kortini, at tað mundi muna lítið, tí tað nyttaði lítið hjá pensjónistum at fara í verkfall....

Tað treyt annars ikki við góðum ætlanum, tá ið politikarar sluppu at siga sína meining. Pensjónirnar skuldi hækkast og skuldi ikki skerjast, tá ið pensjónistur hevði aðra inntøku. Ellis- og røktarheim og eldraíbúðir skulu byggjast í stórum stíli og nógvar milliónir skulu brúkast upp á vælferð hjá teimum eldru.

Óli Breckmann, valevni fyri Fólkaflokkin, vísti á, at vit eiga at síggja aldurdómin sum ein samanhang, heldur enn at býta hann sundur í ávís mørk, so at tey eldru avgjørt skulu halda uppat at arbeiða, tá ið tey fylla 67.

- Teir pensjónistar, sum hava hug, eiga at sleppa at halda fram at arbeiða, uttan at missa so nógv av eftirlønini.

- Tí eiga vit at byggja heimahjálpina út, so at fólk kunnu búgva heima so leingi heima, sum gjørligt og samstundis eiga vit at hava eitt fjølbroyttari úrval av eldrabústaðum.

Hann helt, at tað er alt avgerðandi, at skipanin er so liðilig sum gjørligt, so at vit tosa um ein eldrapolitikk og ikki bara ein pensjónspolitikk.

Heðin Mortensen, valevni fyri Javnaðarflokkin, staðfesti, at í næsta valskeiði verður ongin skattalætti, tí peningurin skal heldur brúkast til vælferð.

Men hann helt eisini, at tað er alneyðugt at byggja